Tórshavn 15.10.2025

Hoyringssvar frá Javna um Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan

(Hámark fyri rakstrarútreiðsluvøkstri og løguætlan)

Javni takkar fyri høvi at gera viðmerkingar til uppskotið um at seta eitt lógbundið hámark fyri rakstrarútreiðsluvøkstri hjá landinum.

Sum áhugafelag fyri fólk við menningartarni og teirra avvarðandi vil Javni vísa á, at uppskotið, hóast ætlað sum búskaparligt amboð, hevur beinleiðis og týðandi sosialar avleiðingar fyri ein bólk av fólki, sum longu hava veikastu fíggjarligu fortreytirnar í samfelagnum.

**<u>Umhvørvið hjá limum Javna</u>**

Limirnir hjá Javna eru brúkarar av Almannaverkinum.
Teir fáa meginpartin av sínum inntøkum gjøgnum:

- fyritíðarpensjón,
- stuðul til bústað og hjálpartól,
- umlætting og aðrar tænastur,
- og tænastur á stovnum undir Almannaverkinum.

Talan er um fólk og familjur, sum í nógv ár hava livað við fíggjarlig lágmørk, og sum hava sera avmarkaðan møguleika at økja inntøkuna sjálvi.

Tí hevur hvør fíggjarlig broyting og serliga ein spariskipan sum hámark fyri útreiðsluvøkstri beinleiðis ávirkan á lívsgóðsku, heilsu og møguleikan at luttaka í samfelagnum.

Møguligar avleiðingar av lógini

a) Fyritíðarpensjónistur við hægstu veiting

Ein einstaklingur við hægstu fyritíðarpensjón fær í dag uml. 14.000 kr. eftir skatt.
Tá prísirnir á matvørum, orku og øðrum grundleggjandi útreiðslum hækka, og javningin av pensjónini ikki fylgir við, minkar keypiorkan støðugt.

b) Familja við inntøkumissi (barn við breki)

Ein familja, har annað foreldur hevur tikið seg niður í hálvt arbeiði fyri at vera um barn við breki, er longu fíggjarliga trýst.
Hóast familjan fær stuðul, fylgir hesin ikki teimum veruligu príshækkingunum á mat og orku.

Hetta merkir, at familjan hevur minni ráð til eyka hjálp, venjing og tiltrongda hvíld. Verður hámark fyri útreiðsluvøkstri lógarfest, er lítil møguleiki at bøta um hesar umstøður, tá tørvur ella kostnaður veksur.

c) Einstaklingur, sum býr á stovni undir Almannaverkinum

Einstaklingar, sum búgva á stovnum, verða beinleiðis raktir av sparingum í rakstri. Tá rakstrarútreiðslur verða bundnar av einum fíggjarligum lofti, kann tað í verki merkja:

- minni tíð hjá starvsfólki til einstaka brúkaran,
- færri møguleikar fyri venjing, sosial tiltøk og útferðir,

Hetta ávirkar bæði trygd og trivnað hjá teimum, sum eru avhengig av stovninum har tey eru búsett.

**Prís- og keypiorkubroytingar**

Seinastu árini hava verið týðandi príshækkingar á matvørum og orku.
Hetta eru vørur og tænastur, sum húski við lágum inntøkum ikki sleppa undan, og sum standa fyri størsta partinum av í teirra dagliga nýtslu.

Samtíðis fylgja almennar veitingar ikki hesum príshækkingum.
Hetta ger, at fólk við breki og pensjónistar missa keypiorku hvørt ár, hóast tey fáa sína árligu javning.

**Samfelagsligar avleiðingar**

Tá sosial tiltøk og almannaveitingar verða bundin av einum fíggjarligum hámarki, verður trupult at laga skipanirnar til veruligan tørv.

Fyri limir hjá Javna merkir tað í roynd og verki:

- at fíggjarlig trygd verður sett fram um sosiala trygd,
- at tænastur mugu veljast frá heldur enn at menna,
- og at fólk við breki gerast meira avhengigar av stuðli frá avvarðandi ella sjálvbodnum.

Hetta er hvørki haldbært ella í tráð við Sáttmálan hjá Sameindu Tjóðum um rættindi hjá fólki við breki (UNCRPD), sum Føroyar hava játtað at fylgja.

**Tilmæli og rættarlig viðmerking**

Javni heitir á landsstýrið um:

1. at tryggja, at almannaveitingar og pensjónir fylgja veruligum prísvøkstri fyri grundleggjandi vørur,
2. at sosialar tænastur og stuðulsskipanir verða undantiknar ella fáa serliga verju í lógini,
3. at gera eina sosiala eftirmeting av lógini áðrenn og eftir, at hon verður sett í gildi, og
4. at tryggja, at tillagingar ikki minka um rættindi sambært Almannalógini og Sáttmálanum um rættindi hjá fólki við breki.

Rættarlig viðmerking:
Sambært Almannalógini (§§ 41, 60 og 69) hevur Almannaverkið skyldu at tryggja, at fólk við breki fáa stuðul, tænastur og hjálp eftir tørvi, fyri at kunna liva eitt virðiligt lív.
Tær nevndu greinarnar vísa eisini, at Almannaverkið hevur bæði *rættartrygdar skyldur og fíggjarliga ábyrgd* at veita stuðul og tryggja rættvísni í skipanini.

Við einum lógbundnum hámarki á rakstrarútreiðslum er veruligur vandi fyri, at Almannaverkið ikki kann halda hesar skyldur, tí fíggjarligu rammurnar ikki fylgja við veruligum prísvøkstri, lønarbroytingum ella øktum tørvi.
Hetta ávirkar beinleiðis evnini hjá Almannaverkinum at veita tænastur eftir § 41 (tørv

hjá tí einstaka), at tryggja fíggjarliga ábyrgd sambært § 60, og at tryggja rætt til stuðul og virðiligt lív sambært § 69.

Javni mælir tí til, at almannaverk og tænastur til fólk við breki verða undantiknar frá hámarkinum, ella at tað í lógini verður ásett, at økið skal prístalsjavnast sambært veruligum útreiðslubroytingum.
Hetta er eisini í tráð við Sáttmálan hjá Sameindu Tjóðum um rættindi hjá fólki við breki (UNCRPD), sum krevur, at fíggjarlig politikkur ikki má skerja atgongd til grundleggjandi tænastur ella stuðul.

Vinaliga heilsan

Javni